## Heðin Kambsdal í Ribarhúsi

Í morgin, leygardagin kl 16 letur Heðin Kambsdal, ljóslistamaður og organistur, upp eina afturlítandi málningaframsýning í Ribarhúsi. Sýningin er opin til mikudagin 20. mars. Tá ið sýningin letur upp, verður røða hildin, sangur og spæl – eitt nú systursynirnir, Jonhard og Rói, spæla og syngja. Hetta er í samband við, at Heðin verður seksti tann 14. mars í ár.

Ljósið, undan hond Heðins, livir í stráum, tinnum, hondum, fingrum og við eygnahvarm. Heimurin syngur í penslastrokunum, og tá ið hann treður urguna í Fuglafjarðar kirkju, eru livandi einglar í litum í ljóðpípunum. Her er ein flóð av ljósi og ljómi, sum er vert er at sjá og lurta eftir. Der er lys i overflod... W.H.

*Frits*



## Tombola og sláa tunnu

Samskipaður tunnusláttur og tombola. Í Klaksvík verða umstøður hjá børnum og barnsligum sálum, at møtast til tunnusláttur í morgin, leygardagin. Tiltakið verður í KÍ-høllini klokkan 14. Har verða eini 10-12 tunnur hongdar upp og so er bara melda seg uppí.

Tað kostar 20 krónur, og bommpakkar verða til øll, og kattakongar fáa stórar vinningar.

Meðan tunnuslátturin fer fram er møguligt at spæla mat- og køkutombola. Kaffi o.a. fæst eisini.

Tað er Klaksvíkar Hornorkestur, ið skipar fyri.




**SCIENCE FICTION?**

*Tá nýggju býbussarnir koma til Havnar, skulu teir hava nýggjastu og mest framkomni tøknina at kunna brúkaran, heldur Levi Mørk, byráðslimur*

*Mynd: xxxxxxxxxxx*

# Bussleiðin við iPhone

**TØKNI Við »Tórshavn City App« skalt tú í tíni iPhone síggja, hvar bussurin er**

**Eirikur Lindenskov**

Á fundi komandi hóskvøld fer tekniska nevnd hjá Tórshavnar kommunu at viðgera málið um GPS-skipan til nýggju bussleiðina. Støða skal takast til, hvat fyri skipan skal vera í nýggju bussunum.

Levi Mørk, sum er næstformaður í teknisku nevnd, hevur fleiri ferðir reist málið um hotspots í Havn, men tað fær kommunan ikki loyvi til at seta upp. Men kannað verður í løtuni, hvat ber til í eitt nú bussleiðini.

Levi Mørk sigur, at møguleikarnir eru nógvir, serliga um GPS-skipanin verður útbygd við hotspots í bussunum og telduskíggjum á busssteðgiplássum.

– Og so ber sjálvandi eisini til nýta androidtelefonir, iPad ella iPhone'ir við einum forriti, sum eitur »Torshavn City App«, sigur Levi Mørk, sum tó vísir á, at fyri tey sum ikki hava hesa dýru útgerðina, so eru ráð fyri tí við eini sms-skipan, so tú sært, nær og hvar bussarnir eru.

## Stór seyðahudakapping á Sandi

Leygardagin fara 20 hundar at luttaka í stórari seyðhundakapping á Sandi.

Kappingin er kvalifikationskapping til Continental í 2012, sum verður í Belgia. Kappingin er skipað í tveir klassar, klassa 2 og klassa 3, sum er fyri teir bestu hundarnar.

Kappingin verður hildin nærhendis Søltuvík á Sandi. Hetta er helst

Størsti teinur, sum er brúktur til hundakapping í Føroyum.

Kapping er líknandi teimum, sum vit eitt nú kenna frá sendingum, vit hava sæð á BBC sum kallast "one man and his dog".

# Lesandi hitta politisk

Tær komandi seks vikurnar fer MFS at hava eitt prát við eitt politiskt ungmannafelag, hvønn fríggjadag frá kl 15:30 til 16:30. Byrjað verður 11. mars.

Prátið verður á Seturskaféini, ið er á Hvonn í Tórshavn. Prátið fer at snúgva seg um útbúgving og hvørja støðu tey politisku ungmannafeløgini hava til útbúgving, og tað, ið har hoyrir til.

Seturskafe er eitt vanligt tiltak uttanlands, har lesandi hittast til hugna og prát, ið vanliga er hvønn fríggjadag. Seturskafe er við til at menna eitt livandi lestrarumhvørvi; og veitir hon eisini ein avsláttur til tey lesandi.

Kaféin á Hvonn er hvønn fríggjadag frá kl 14 til kl 17.

Møguleiki verður eisini fyri at fáa eitt prát við MFS-nevndini og at tekna seg sum lim í MFS. Limaskapur er ókeypis.

Tey, ið manna MFS-Føroya nevndina eru:

*Teitur Vágadal, formaður*
*Maria í Skorini, varaforkvinna*
*Guðrið S. R. Poulsen, skrivari*
*Pætur Vágadal Joensen nevndarlimur*
*Rita Dam Simonsen nevndarlimur*
*Johann J. Petersen nevndarlimur*

MFS letur heilsa, at øll eru vælkomin á Seturskafe.
MFS-Føroyar



**POLITIKKUR**

*Toyota hevur so mangan verið mest seldi bilur í Føroyum. Soleiðis var eisini í fjør*

# Avgerðin fellir kl 13

**POLITIKKUR Stríðsvalið um formanssessin í Javnaðarflokkinum verður í Norðurlandahúsinum í morgin klokkan 13**

**Eirikur Lindenskov**

Eykalandsfundurin hjá Javnaðarflokkinum byrjar í morgin, leygarmorgunin, klokkan 9:30 við morgunmati. Klokkan 10 fær Jóannes Eidesgaard, fráfarandi formaður orðið. Á middegi verður frokostur, og hæddarpunktið verður síðani klokkan 13, tá formansvalið er. Sambært skránni er fundurin liðugur klokkan 15:30.

Hóast tað er greitt frammanundan, at Aksel V. Johannesen verður nýggjur formaður, so verður talan um stríðsval, tí trý uppskot eru um formansevni. Størstu undirtøkuna hevur Aksel V. Johannesen, hini uppskotini eru Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn og John Johannessen, landsstýrismaður í heilsumálum..

Tey, sum higartil hava stuðlað Akseli V. Johannessen eru:

*Norðoyar Javnaðarfelag við 20 atkvøðum*
*Eysturoyar Javnaðarfelag við 25 atkvøðum*
*Norðstreymoyar Javnaðarfelag við 8 atkvøðum*
*Suðuroyar Norðara Javnaðarfelag 22 atkvøðum*
*Vága Javnaðarfelag við 12 atkvøðum*

Og tey, sum higartil hava boðað frá, at tey stuðla Heðini Mortensen eru:

*Suðuroyar Sunnara Javnaðarfelag við 12 atkvøðum*
*Javnaðarfelag í Sandoy við 8 atkvøðum.*

Um Suðurstreymoyar Javnaðarfelag býtir sínar atkvøður leygardagin, sum á limafundinum týskvøldið, so verður endaliga býtið á eykalandsfundinum hetta:

*Aksel V. Johannesen 101 atkvøður*
*Heðin Mortensen 40 atkvøður*
*John Johannessen 2 atkvøður*